# Lítil áhugi fyri kommunusamanlegging

**Føroysku kommunurnar hava lítlan áhuga í kommunusamanleggingum. Hóast ongar ætlanir eru um at noyða kommunur at leggja saman, so halda tær lítið um eitt uppskot frá landsstýrinum um sjálvbodna kommunusamanlegging.**

SJÁLVBÐIN SAMANLEGGING
*Magnus Dam*

Landsstýrið skal ikki gera av, at kommunur skulu leggja saman, og myndugleikarnir skulu heldur ikki gera av, hvørjar kommunur skulu leggja saman.

Hetta tykist vera hugsanin í flestu kommununum, sum hava sagt sína hugsan um eitt uppskot hjá landsstýrismanninum í lógarmálum um sjálvbodna kommunusamanlegging. Høgni Hoydal, varaløgmaður, legði uppskotið fram leygardagin, og tað sæst í viðmerkingunum frá kommununum, at fleiri teirra eru ikki serliga heitar fyri uppskotinum.

12 kommunur hava givið sína støðu til kennar, og tað er bert Tórshavnar kommuna, sum uttan treytir tekur undir við uppskotinum. Hinar 11 hava allar síni fyrivarni.

Við lógini verður staðfest, at ein og hvør kommunusamanlegging er sjálvboðin, og hetta er uttan iva nakað, sum hóvar kommununum væl. Eingin vil hava eina avgerð um samanlegging kroysta oman yvir seg. Men tað, sum hóvar kommununum minni, er, at landsstýrið í uppskotinum ger av, hvørjar kommunur kunnu leggja saman. Uppskotið sigur, hvørji mørk ein kommuna skal halda seg innanfyri, um hon ætlar at leggja saman við einari aðrari.

## Sjey eindir

Landsstýrið sigur í uppskotinum, at kommunusamanlegging kann fara fram innan sjey eindir. Norðoyggjar, Vágar og Mykines, Sandoyggin og Suðuroyggin eru hvør sín eind og kommunurnar í hvørjari av hesum oyggjunum kunnu sostatt velja at leggja saman í eina kommunu. Suðuroyggin hevur kortini valið millum at gerast ein eind ella tvær.

Allar kommunurnar í Eysturoynni uttan tær í Sundalagnum kunnu velja at leggja saman í eina kommunu. Men viðvíkjandi Eysturoynni eru kortini fleiri valmøguleikar. Fuglafjarðar, Leirvíkar og Gøtu kommunur kunnu velja at gerast ein eind, og Nes, Runavíkar, Skála Sjóvar, og Oyndarfjarðar kommunur kunnu velja at gerast ein eind. Sundalagið er ein eind, og afturat sær kunnu tær fáa Funning og Elduvík, sum kunnu velja millum fleiri av hesum eindum.

Kommunurnar, sum síðani eru eftir í Streymoynni og Nólsoyar og Hests kommunur eru ein eind, og tær kunnu sostatt velja at leggja saman í eina kommunu.



*Kollafjarðar og Tórshavnar kommunur løgdu saman í eina kommunu 1. januar, og aðrar kommunur fáa skjótt møguleikan at leggja saman. Eitt uppskot um sjálvbodna kommunusamanlegging er komið í løgtingið.*

## Ongan skund

Lógaruppskotið hjá landsstýrinum staðfestir, at allar kommunusamanleggingar eru sjálvbodnar. Tað kemur kortini fram í uppskotinum, at fólkatalið helst skal fara upp um 2000 í teirri samanløgdu kommununi.

Men líkt er ikki til, at tað júst er hetta lógaruppskotið, sum kommunurnar hava sitið og bíðað eftir fyri at kunna fara í gongd við eina samanlegging. Fleiri kommunur gera bart og siga, at tær als ikki taka undir við kommunusamanlegging, meðan aðrar finnast at teimum eindunum, sum eru skotnar upp í uppskotinum. Aðrar halda freistina at svara vera ov stutta, og tí hava tær ikki viðgjørt uppskotið enn.

Tórshavnar kommuna og Vágs kommunur eru tær, sum minst av øllum hava nakað ímóti uppskotinum, men fleiri nýggj sjónarmið koma helst fram frá bæði kommunum og einstaklingum, tá løgtingið fer at viðgera uppskotið ein av komandi døgunum.

# Føroya Banki skal fíggja kreppugrunn



**Jenis av Rana hevur nú lagt fram uppskot um at stovna ein grunn, sum skal gjalda kreppuraktum sethúsaeigarum endurgjald. Skattainntøkur frá Føroya Banka skulu fíggja grunnin**

ENDURGJALDSGRUNNUR
*Magnus Dam*

*Síðani 1994 hevur Føroya Banki goldið 183 milliónir krónur í skatti. Jenis av Rana vil hava landsstýrið at seta 10 prosent av hesum pengunum í ein endurgjaldsgrunn fyri kreppuraktar sethúsaeigarar*

Hesi seinastu árini hava verið góð við Føroya Banka. Yvirskotini hava verið upp í fleiri hundrað milliónir krónur um árið, og landskassin hevur fingið sín ríkiliga part av avlopinum.

Ein partur av hesum pengunum eigur at koma teimum til góðar, sum mistu húsini hjá sær í kreppuárunum, heldur Jenis av Rana úr Miðflokkinum. Hann skjýtur upp at stovna ein endurgjaldsgrunn fyri kreppuraktar sethúsaeigarar, og stovnsfæið skal vera ein partur av skattinum, sum Føroya Banki hevur goldið seinastu árini og fer at gjalda komandi trý árini.

Síðani 1994 hevur Føroya Banki goldið 183 milliónir krónur í skatti, og 10 prosent av hesum skulu fara í grunnin, heldur Jenis av Rana.

Hann vísir í viðmerkingunum á, at tey flestu tykjast at hava funnið stevið aftur eftir kreppuna, men tað er framveigs ein bólkur, sum ikki er komin frá kreppuni í øllum góðum.

– Hesin bólkur er teir sethúsaeigarar, sum ikki megnaðu at sita í egnum húsum, teir mistu húsini og sótu eftir við risaskuld uttan virði aftanfyri, sigur Jenis av Rana, sum samstundis spyr, hví landskassin skal bjarga einai heilari bankaverð og stóru peningainnskotum teirra vælbjargaðu, samstundis sum hesi omanfyrinevndu verða gloymd.

## Livdi ikki upp til politisku ætlanirnar

Jenis av Rana heldur ikki, at Føroya Banki livdi upp til politisku ætlanirar, tá ið bankin varð bjargaður. Av hesi orsøk hevur hann havt órímiliga stóran vinning av afturvunnum avskrivingum, sigur tingmaðurin. Tí heldur hann tað vera rætt, at stovnsfæið í endurgjaldsgrunninum kemur frá tí skatti, sum Føroya Banki hevur goldið.

Sambært uppskotinum skal grunnurin kunna veita teimum sethúsaeigarum endurgjald, sum heilt ella lutvíst mistu húsini í kreppuárunum og komu at sita við skuld, uttan at ogn var aftanfyri. Grunnurin skal hava eina trý-manna nevnd, sum skal meta um missin hjá teimum, sum søkja um endurgjald, og endurgjaldið skal svara til tann staðfesta missin.

Jenis av Rana hevur onga meting um, hvussu nógv fólk kunnu hugsast at søkja ella hava rætt til stuðul úr endurgjaldsgrunninum.



# Aftur eitt skot-drama á skúla í USA

**Mánadagin fór USA aftur í skelk, tá ein fimtan ára gamal drongur myrdi tveir skúlanæmingar og særdi 13 aðrar á skúlanunum, hann gekk á.**

*Niclas Johannesen*

So hendi tað aftur. Mánamorgunin skeyt 15 ára gamal drongur við skørpum móti sínum skúlakammeratum á Santana Háskúlanum í einum forstaði uttan fyri San Diego í California. Við einum smíli á varrunum sóu vinirnir Williams fylla revolvaran í minsta lagi fýra ferðir við kúlum og síðani at skjóta í eyst og vest. Tveir næmingar doyðu og 13 blivu særd, áðrenn alvápnaðir løgreglumenn herjaðu á skúlan og handtóku tann framvegis smílandi Williams á dreingja wc'inum.



## Happaður

Hóast USA er eitt ræðandi dømi um harðskap og skotgirnd millum ungdómar, sum í mongum førum ikki eru so frægt sum hava grulvað um kriminella aldursmarkið, so tóktust øll í hesum friðaliga forstaðnum til San Diego at vera í kollektivum sjokki.

CNN var á staðnum alt fyri eitt. Samstundis sum ógreiða var á, hvussu nógv vóru deyð, úttalaði ein klassavinur seg um, hvussu hon slettis ikki kundi ímynda sær, at Williams kundi finna upp á nakað so ræðuligt. Hann var altíð so smílandi.

– Hann var fittur og stuttligur og kundi aldrin funnið upp á nakað slíkt, segði fimtan ára gamla Shannon Durret, ið hevur kent Williams síðani september í fjør.

Ein skelkað móðir segði, at hon júst hevði sett búgv her, tí at kriminaliteturin var metlágur. Nú hevði hon fingið nakað at hugsa um.

Tað kom eisini fram, at Williams er ein happaður drongur, ið hevur livað einsamallur saman við pápanum. Hinir næmingarnir vóru eftir honum, tí hann var so lítil av vøkstri og ikki varð mettur at vera millum tey snildastu. Men hann tók altíð alt spott og spá á seg við einum smíli. Inntil mánamorgunin.

## Hótti frammanundan

CNN fekk eisini skjótt fatur á einum manni – faðir at einum øðrum næmingi á skúlanum – ið kundi greiða frá, hvussu Williams hevði sovið hjá teimum júst farna leygarkvøld, og hvussu hann tá í spølni hevði sagt, at hann fór at skjóta á skúlanum. Men hetta var skjótt sligið upp í glens, og Williams segði, at tað kundi hann aldrin funnið uppá.

Men mánadagin gjørdi hann tað so kortini. Og øll tey klassisku tekini vóru har frammanundan. CNN kunngjørdi, hvussu ein kanning av teimum mongu skotræðuleikunum á amerikanskum skúlum seinastu árini vísir at allarflestu gerningsmenninir boða vinum frá teirra ætlan – men ongin trýr teimum, tí tey halda, tað er so langt úti.

## Broyta vápnalóg

Nú verður so aftur dúgliga kjakast um vápnalógina í landi, har skotvápn er undir næstan hvørjum kodda. Ein lækni á sjúkrahúsinum, har næmingarnir blivu viðgjørdir, duldi ikki sína hugsan á Larry King Live. Hann segði, at nú mátti Amerika vakna og lætta atgongdin til vápn hjá ungum, illum tannáringum steðgast. Hann helt, at hagtølini søgdu sína ræðandi søgu.

Nývaldi forsetin George W. Bush kallaði sorgarleikin eina skammiliga og feika gerð. Forsetin vildi ikki siga nakað annað enn, at hansara bønir fóru til Santana Háskúlanum og fyrst skuldu fólk sleppa at syrgja, áðrenn politiskar avgerðir skuldu takast.

Skeptikarar haldar kortini ikki, tað er serliga sannlíkt, at fría amerikanska vápnalógin verður herd undir verandi forseta – eitt nú, tí republikanararnir fingu so dyggan fíggjarligan stuðul frá vápnaídnaðinum til valið í fjør.

Fleiri hundrað næmingar og arbeiðsfólk blivu eisini avhoyrd mánadagin, ein næmingur hevði enntá tikið myndir og filmað meðan skotið var inni í skúlanum. Løgreglan hevði lagt hald á alt tað tilfarið.

Fimtan ára gamli Williams verður ákærdur í rættinum sum ein vaksin og ikki sum eitt barn. Hann varð eisini sendur til sálarkanningar mánadagin, sum er vanligt í slíkum førum, men seint mánakvøldið vildu myndugleikarnir onki siga um úrslitið av hesi kanning. Williams er eisini undir 24 tímars varðhaldi og eftirsýni, tí myndugleikarnir vilja tryggja sær, at hann ikki ger enda á sær sjálvum.

VIÐMERKINGAR

# Journalistisk armóð

**Dánjal J. Hansen**
Norðoyri 20/2 2001

Tað sigst at hornasteinurin í einum demokratiskum samfelag er tann frælsa pressan. Ein fræls pressa kann halda eyguni við makthavarum so at teir ikki sleppa væl frá at misbrúka sítt vald. Pressan kann fylgja við so at einki verður dult fyri fólkinum og at upplýsingar sum koma fram til fólkið umframt at vera rættir, eisini eru fullfíggjaðir. Helst hevur pressan eisini arðar uppgávur, og um hon røkir allar hesar uppgávurnar má hon sigast at vera verja fólksins eins og hon gerst ein týðandi partur í einumhvørjum almennum kjaki.

Í Føroyum hava vit í prinsippinum eina frælsa pressu, men her nýtir pressan sítt frælsi til at leggja seg at snorksova. Tey bæði stóru bløðini eru lítið annað enn talurør hjá Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum. Umframt lesarabrøv og greinar sum politikkarar hava skriva, eru bara einstakir smávegis tíðindastubbar. Blaðfólkini, ja sjálvt Óli P., gerast bara papageykar hjá teimum báðum flokkunum. Ovast á breddanum á Dimmu stendur at hon er óheft og álítandi. Og helst er hon álítandi. Hon skal bara endurgeva tær innsendu greinarnar og lesarabrøvini rætt, so lýgur hon ikki meir enn henni er logi. Óheft er hon so aldrin í verðini.

Tað at bløðini eru heft at sínum polittisku flokkum er so tað tað er. Vit vita tað og so kunnu vit leggja upp fyri tí. Og er tíðindaflutningurin og journlistikkurin í lakara lagi so kunnu vit bara lata vera við at keypa tey og so er ikki meira um tað. Verri er við teimum elektronisku miðlunum. Tveir av hesum, teir størstu, eru almennir, public service miðlar, og skulu, umframt at vera óheftir, eisini halda eitt ávíst journalistiskt støði. Tað verður sagt frá fleiri síðum at fólk eru ørkymla í fullveldismálinum. Jamen er tað so løgi? Politikarar frá bæði samgongu og andstøðu sleppa at snara úttalilsum, beinleiðis lúgva, møsna, broyta síni sjónarmið í einum andarhaldi, skáka sær undan spurningum, og annars tilpassa sær úttalisir hjá teimum sjálvum eins og ørðum, uttan at »journalistarnir« geva tí nakran stórvegis ans. Reint mikrofonhaldarí. Sjálvandi eru fólk ørkymla. Eingin setir politikarnar uppá pláss og forðar fyri at kjakið fer av sporinum. Hví verða politikarar sum Høgni Hoydal og Jóanes Eidesgaard, Emund Joensen og Anfinn Kallsberg ikki tiknir inn í útvarpsstovuna og endavendir nakrar ferðir? Hví vera teir ikki konfronteraðir við upptøkur av andsøgnum í tí teir hava sagt og tráspurdir um veruligar ætlanir, heldur enn at teir sleppa púra ótarnaðir at kasta runu eftir hvørjum ørðum og harvið púra avskepla tað kjak sum er so sera tíðandi í einari demokratiskari gongd? Ein sending sum kallast Kjaktorgið er fastur táttur í útvarpinum. Sendingin 14. februar var um skrivingina í Ekstrablaðnum um undirgrundina. Eg legði fleiri ferðir til merkis at verturin tók dik á seg til at siga okkurt, men tað bleiv ikki til meira enn eitt »Øh« so varð hann avbrotin av polittikarunum sum so sluppu at halda á við runukrígnum. Sjálvandi eru fólk ørkymla. Umframt at vera í iva um hvørja støðu tey skulu taka til spurningarnar sum skora á, mugu tey eisini sjálvi leita gullkornini burturúr øllum tí skarni og óruddi sum er sloppið ígjøgnum »journalistisku mylluna« uttan serligar viðmerkingar.

Fimmarin 21. februar um privatisering av Strandferðsluni var aftur ein sending har tað æviga sjabbið millum samgongu og andstøðu, høgra og vinstra, privat og alment var í centrum. Helt meg hoyra at lurtarar kundu ringja inn. Men so vítt eg hoyrdi var ongin lurtari inni. Um tað var tí at teir ikki sluppu framat fyri Bjarna og Dan ella um tað var tí at Fimmarin er vorðin so keðiligur at ongin tímir at ringja inn, veit eg ikki, men eitt er vist. Journalistiska íkasti til sendingina varð hildi á einum minimalum støði. Sama gamla runukríggji átti sendingina við høvd og gørnum. Eg kenni nógv fólk sum eru øgiliga misnøgd við tað tænastuna sum Strandferðslan veitir, og eg kenni fólk sum eru væl nøgd við sama stovnin. Tey hava hvør sín tørv, hvør sínar royndir og hvør sínar umstøður at taka støðu út frá. Reidar Nónfjall man hava kett seg øgiligt í munnhøggarínum. Hann man vita at veruligu trupulleikarnir og loysnirnar munnu liggja onkustaðni ímillum ideologiirnar hjá teimum báðum polittikarunum. Teir nýttu sjálvandi ein part av sendingini til at leggja hvønn annan undir at síggja problemið gjøgnum tær ideologisku brillurnar. Jú, jú. Verturin lá skerflatur afturá og bíðaði.

Nú hevur Útvarp Føroya fingið toyggi, men veruleikin er at Sjónvarpið er nógv verri, tí har eru at kalla ongar sovorðnar dagsaktuellar sendingar, tíðindasendingin undantikin. Og har verða, eins og í útvarpinum, bara fittir spurningar settir. Næstan ongir illavorðnir. Teir fáu sum koma eru ofta so illa fyrireikaðir at syndarin sleppir snikkaleysur undan við at geva í besta føri eitt ófullfíggjað svar. Snaringar, skeiklingar, møsn osfr. osfr. er tað mest vanliga. Vit velja tó at trúgva at tá ið sjónvarpið fær meira pengar at arbeiða við verður betri.

Í hesum døgum við stjørnarkreppu og fullkomnum ruðulleika, har ið fullveldismálið, sum Landsstýrið hevur lagt eina øgiliga orku í tey seinastu 3 árini, liggur í andaleypi, er ein gyltur møguleiki hjá pressuni at vísa at hon er ein fræls og kompetent pressa. Enn hevur hon so ikki gjørt nakað stórvegis útyvir tað vanliga mikrofonhaldaríi og endurgevingar av tí sum politikarar og onnur hava sagt, men tað kemur kanska.

Skulu vit nakrantíð fáa nakað veruligt, og fyri demokratiið so alneyðugt, kjak um so stór mál sum t.d. fullveldi og undirgrund, so má pressan vakna og fara til arbeiðis. Ikki fyri at verja ávís politisk áhugamál, ikki fyri at fylla skránna hjá út- og sjónvarpið og blaðsíðurnar hjá bløðunum, men fyri at syrgja fyri at fólk, umframt at fáa viðkomandi og áhugaverd tíðindi, eisini fáa verulig ting at taka støðu til og at tey hava rættar og fullfíggjaðar upplýsingar at taka støðu út frá. Útskammaða danska Ekstrablaði (sum eg sjálvur heldur ikki havi nakra serliga virðing fyri) ger so hóast alt eitt uppsøkjandi arbeiði. Taka vit sølufremjandi gølufabrikatiónina burturúr skrivingini um føroysku undirgrundina, stendir eftir at teir hava reist eitt kjak sum føroyska pressan ikki hevur megna nakrantíð, uttan tá ið Høgni Hoydal og arðir gjørdu sendingina um bankamálið á sinni.


